tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 196 Friggjadagur 11. oktober 1996 70. árgangur Krónur 7.00

## Støða Føroya í ríkinum kannast



*Marita Petersen hevur lagt fram uppskot um at fyrireika arbeiðið at broyta stjórnmálaviðurskifti Føroya*

**Síða 3**

<u>*Ivan Johannesen, landsstýrismaður í sjúkrahúsmálkum:*</u>

# Axel mistók seg - DIOS var betra loysnin

*– Einasta loysnin er, at viðurskiftini á Landssjúkrahúsinum verða tikin upp til nýggja viðgerð. Tað var skeivt av Axel Nolsøe at taka ein starvsbólk framum annan, heldur landsstýrismaðurin, sum fyribils skal umsita sjúkrahúsverkið í landsstýrinum*



*Hóast Ivan Johannesen ikki ætlar at gera tær stóru broytingarnar, nú hann fyribils skal umsita málini hjá Axeli Nolsøe, hevur hann víst á, at honum betur dámar tilmælið frá DIOS*



*Johan Anthoniussen og Jógvan Hugo Hansen verða teir fyrstu føroysku oljuverkfrøðingarnir*

*AMG-oljusamtakið longu til reiðar:*

# Kunnu siga, hvar borast kann í føroyskum øki

*Oljufeløgini Mobil, Statoil og Enterprise hava longu boripall kláran til føroyska økið. Byrjast kann so skjótt loyvi fyriliggur - í 1998*

**Síða 9 & baksíðan**

P/f Jørgen Christiansen
Hava tit grundstykkið - so hava vit húsini
Tlf. 10544
86544
Fax 17958

Einasta blaðið 5 ferðir um vikuna

tíðindablaðið
# sosialurin

Telefon 11820 Telefax 14720

Sosialin finnur tú á Internet:
http://WWW.cybernet.dk/faroe-news
e-mail: sosialur@olivant.fo

## veðrið

Lagtrýst, 958 hPa, yvir Atlantshavinum á 55n/30v rekur í landnyrðing og dýpist ógvuliga og fer fríggjadagin skjótt norður um Føroyar. Leygardagin viðkast hátrýst suður yvir Ísland og nýtt lagtrýst, sum elvir til vind og avfall á okkara leiðum, rekur móti vestaru havleiðum Skotlands. Mánadagin og týsdagin verður lagtrýstið kanska støðugt sunnan fyri Føroyar, aðrenn tað kanska snarar móti syðru íslandsleiðunum.

**Fríggjadagin**



Út á fyrrapartin stilkkur hann vesturum, millum stríð í vindi og skrið, 13-18 m/s, av útsynningi, ódrigið, regn og hert tøluligt ella vánaligt sýni, stormur, 25 m/s, við ógvisligum vindblokum av vestri seinnapartin og út á kvøldið, minni avfall og frægari sýni. Hitin umleið 9 stig. Leygarnáttina makandi til millum andøvsgul og stríð í vindi, 8-13 m/s, av útnyrðingi, bert æilingur, men betri sýni. Hitin niður í 6 stig.

**Leygardagin**

At byrja við strýt andøvsgul, 10 m/s, av útnyrðingi, ódrigið, okkurt æilið, seinni makandi til millum lot og andøvsgul, 3-8 m/s, av landnyrðingi, ódrigið, æilingur fyrrapartin, seinni turt. Sunnunáttina fráskandi til millum strýt andøvsgul og hvassan vind, 10-15 m/s, av landnyrðingi, men turt og helst gott sýni. Hitin umleið 8 stig.

**Sunnudagin**

Fráskandi til millum skrið og storm, 18-23 m/s, av landnyrðingi og eystri, ódrigið og summ fráløður regn og vánaligari sýni. Hitin umleið 9 stig.

**Mánadagin og týsdagin**

Millum hvassan vind og skrið, 15-20 m/s, av landnyrðingi, ódrigið, regn og hert tøluligt sýni, tó kanska makandi vindur av landsynningi og turrari. Hitin umleið 9 stig.

# Upp at meta um tørvin

Randi Jacobsen

Bjørg Haraldsen eitur ein føroysk kvinna, sum í fjør tók prógv í Danmark sum zonuterapeutur.

Hon kemur í morgin heim til Føroya at vitja, í fyrsta umfari í eina viku, og ætlanin hennara er at vita, um grundarlag er fyri at koma til Føroya av og á at arbeiða.

Umframt at hava lært zonuterapi hevur Bjørg eisini lært at geva neuromuskulera massagu, sum er góð saman við zonuterapi. Harafturat dugir hon at geva akupressur, sum er akupunktur men við ongum nálum.

Bjørg verður at hitta frá í morgin á tlf. 44085 í Fuglafirði ella á tlf. 14018 í Havn.

Hon býr annars á Tjørnegårdsvej 23 í Roskilde og hevur tlf. 42-367140.





*Her eru teir á rúsndarpalli Ullrigg í Stavanger*




# Føroyskir oljuverkfrøðingar um eitt ár

Jan Müller

Jógvan Hugo Hansen og Jóhan Antoniussen eita teir. Í løtuni eru teir við at útbúgva seg til oljuverkfrøðingar á Distriktshøgskolan í Stavanger og verða um eitt ár teir fyrstu føroyingarnir, sum hava útbúgvið seg sum oljuverkfrøðingar, síðani áhugin fyri Føroyum sum oljuøki tók seg upp.

Tað er AMG-oljusamtakið, sum fíggjar útbúgving teirra og endamálið við hesum tiltaki at vera við til at fáa Føroyum útbúgvið fólk á hægri støði til at taka lut í og byggja upp eina oljuvinnu.

Harald Snarvold frá Enterprise sigur, at síðani teir lýstu í føroysku bløðunum hava teir fingið nógvar umsóknir og hetta eru so teir fyrstu, sum fara undir hægri lestur við til fyri eygað at vera við í eini komandi føroyskari oljuvinnu.

Ætlanin er at einir 5-6 aðrir føroyingar, verkfrøðingar, jarðfrøðingar og búskaparfrøðingar skulu til at taka aðrar líknandi hægri útbúgvingar, og har AMG rindar allar útreiðslur.

– Hetta verður gjørt fyri at fyrireika Føroyar til eina oljuvinnu men eingin binding liggur í hesum. Grundtankin er at teir skulu vera við í føroysku oljufyrisitingini ella virka har teir nú sjálvir halda tað vera best, sigur Harald Snarvold.

## Vestfalskyrrindi

6. oktober: Mánin longst frá jørðini
12. oktober: Tendring

| Dato | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | Suðuroyar-/Vágafirði sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | Haraldssundi/Leirvíksfirði fp. | Haraldssundi/Leirvíksfirði sp. | Skúvoyarfirði/Skopunarfirði fp. | Skúvoyarfirði/Skopunarfirði sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | Hestfirði/Sundalagnum sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 okt | 0624 | 1844 | 0824 | 2044 | 0439 | 1659 | 0639 | 1859 | 0524 | 1744 | 0539 | 1759 |
| 12 okt | 0704 | 1925 | 0904 | 2125 | 0519 | 1740 | 0719 | 1940 | 0604 | 1825 | 0619 | 1840 |